## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði, seinnapartin nakað minni vindur av útnyrðingi. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og lavaælingur, men um kvøldið minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt. Hitalagið millum ÷5 og ÷2 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og kavi ella regn. Hitin kemur upp í eini 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og regn, Týsdagin minni vindur av eystri og ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Pyro Marketing strategi



**Pyro Marketing snýr seg um at festa eld í, har turt er – tvs. at kanna eftir, hvar størstur tørvur er fyri júst tínari vøru og so møta hesum tørvi og geva brúkarunum júst tað, tey ynskja sær.**

MARÐNAÐARFØRING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Ístaðin fyri at brúka allar kreftirnar uppá at royna at tendra eitt stórt bál eitt stað, har ilt er at festa í, so festir ein heldur fleiri smærri eldar, har turt er. Tvs. eingin orsøk er at brúka eina rúgvu av orku og pengum, har áhugin er lítil, og har ein kanska skal kappast við so nógv annað, sum hevur nógv størri áhuga. Heldur leggja orkuna í serligum nichum – har, sum júst okkara vøra frammanundan er eftirspurd.

### »Tónleikur selur fisk«

Í seinastu viku sendi SamVit eitt tíðindaskriv út vegna fyrireikararnar av ymiskum tiltøkum til frama fyri føroyskan tónleik. Í tíðindaskrivinum vóru fleiri smærri tíðindastubbar um tey aktuellu tiltøkini, har ein av tíðindastubbunum hevði yvirskriftina: ”Tónleikur selur fisk”. Henda orðingin sipaði sjálvandi ikki til endamálið við øllum tiltøkunum (so sum tað er blivið tulkað av onkrum), men var meint sum ein staðfesting av, at tónleikur kann vera við til at branda Føroyar – og tí óbeinleiðis eisini kann vera við til at selja fisk. Tað ræður um at fáa fatur á júst teimum, sum veruliga virðismeta og kunnu gerast ágrýtin um tað, tú hevur at bjóða. Harvið fært tú nakrar góðar ambassadørar fyri tína vøru. Og haðani kunnu eldarnir so festa í og spjaða seg aðra staðir eisini.

### Kent frá t.d Myspace

Hetta er ein marknaðarføringsháttur, sum hevur víst seg at virkað sera væl – ikki minst á internetinum t.d. via MySpace og YouTube. Sæð frá einum Pyro Marketing strategiskum sjónarmiði hava fyrireikararnir mett Brússel í Belgia at vera ein serliga spennandi marknað beint nú, júst tí áhugin har fyri tónleiki frá okkara breiddarstigi er so stórur í løtuni. Tí er tað skilagott at festa í júst har.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -19 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -9 |
| Ammassalik | -13 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -6 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | - |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 10 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 957 hPa. við Føroyar fer spakuliga í landsynning og gevur storm á okkar leiðum komandi samdøgur.




**Í dag:**
Stormlágtrýstið við Suður-Noreg fer spakuliga eystureftir. Ein hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður væntandi yvir Føroyum leygarkvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/01 kl. $06^{00}$ – 31/01. $06^{00}$. Hitin í gjár: 2,5°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

### AVFALLIÐ




Avfallið: 17,0 mm – mált frá 30/01 kl. $06^{00}$ – 31/01. $06^{00}$
Avfallið higartil í januar: 137 mm







### VESTFALLSKYRRINDI

30. jan Seinna kvarter
31. jan Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. jan. | 00.04 | 12.38 | 11.38 | - | 11.53 | - | 02.04 | 14.38 | 03.04 | 15.38 | 10.53 | 23.29 | 09.53 | 22.29 | 00.19 | 12.53 | 01.19 | 13.53 | - | 12.23 | 01.04 | 13.38 |
| 31. jan. | 01.14 | 13.50 | 00.14 | 12.50 | 00.29 | 13.05 | 03.14 | 15.50 | 04.14 | 16.50 | - | 12.05 | 11.05 | 23.26 | 01.29 | 14.05 | 02.29 | 15.05 | 00.59 | 13.35 | 02.14 | 14.50 |
| 1. feb. | 02.11 | 14.33 | 01.11 | 13.33 | 01.26 | 13.48 | 04.11 | 16.33 | 05.11 | 17.33 | 00.26 | 12.48 | 11.48 | - | 02.26 | 14.48 | 03.26 | 15.48 | 01.56 | 14.18 | 03.11 | 15.33 |
| 2. feb. | 02.56 | 15.19 | 01.56 | 14.19 | 02.11 | 14.34 | 04.56 | 17.19 | 05.56 | 18.19 | 01.11 | 13.34 | 00.11 | 12.34 | 03.11 | 15.34 | 04.11 | 16.34 | 02.41 | 15.04 | 03.56 | 16.19 |
| 3. feb. | 03.42 | 16.05 | 02.42 | 15.05 | 02.57 | 15.20 | 05.42 | 18.05 | 06.42 | 19.05 | 01.57 | 14.20 | 00.57 | 13.20 | 03.57 | 16.20 | 04.57 | 17.20 | 03.27 | 15.50 | 04.42 | 17.05 |